MÁLTEIGURIN

Telepoesi

Maðurin hevur rætt í, at nógv vánaligt kemur út á føroyskum. Vit hava sett málcensur í staðin fyri litterera dygd. Men hendan bókin er eitt dygdarverk, vøkur í útsjónd, løtt at lesa og finna runt í, men annars nakað tung. Hon vigar næstan eitt kilo.

Hendan nýggja telefonbókin inniheldur ein hóp av gagnligum upplýsingum: gøtunøvn, býarkort, postnummur osfr. Hetta er óivað tann besta føroyska bókin í 1997.

Men vankunnleikin til tað latínska alfabetið ørkymlar. Bókin heldur seg í støðum til tað alfabetið, sum vit hava brúkt frá Svabo til Matras, men í sjálvum høvuðspartinum, yvirlitinum yvir *abonnentar*, eru bókstavirnir a og á, i og í, o oó, u og ú og y og ý skildir sundur og upphevjari til stavir hvør fyri seg. Eitt annað alfabetiskt bragd á sjálvstýrisleið er framt av skúlunum, sum kalla parallellklassarnar A, B, Đ, E…

Á síðu 4 verða 'tú' og 'tygum' brúkt hvørt um annað: *»Bókin…, sum tygum nú sita við og lesa í. Vit vóna, at bókin fer at tæna tær væl.«* Kanska átti ein týðandi og virdur stovnur sum Telefonverkið at hildið seg til tygumformin?

Ein teknisk atfinning: Tað hevði verið logiskari at koyrt alla reklamuna afturum og sett abonnentarnar á fyrstu síðu. Sum er, koma teir ikki fyrr enn á síðu 145.

Annars sæst í lýsing í bløðunum, at Telefonverkið kallar EDV-funktiónina *servari* fyri *ambætari*. Hví nú tað? Tað fornnorrøna 'embætti' kemur av tí gotiska 'andbahts' (tænari). Tað er skylt við ta ðýska 'Amt', sum vit hava í 'amtmaður', men á føroyskum hevur 'ambæta' fingið týdningin: geva neytunum. Matras og Jacobsen (1961) nevna eisini týdningarnar 'lave mad' og 'opvarte'. Men vit hava jú eisini tað latínska orðið *servus* (trælur, tænari) í málinum. Okkara gentur og konur servera tá ið brúdleyp er, ein politikari kann vera servilur, og onkur man minnast servantin. Vit serva eisini í badminton. Tað er tí so líkatil, at vit í EDV-samanhangi *serva* við *servaranum*.

Tey heimagjørdu orðini eru ólukkudýr og mistrivningar. Einaferð skuldi telefon eita røðil, og tá stóð uttan á telefonbókini, at kastið skuldi vindast *fljótt* runt (hetta var áðrenn Ericsson). Hvat verður vunnið við sovorðnum páfundum? Tað tykist sum, at málið fyri summum er ein tvøga, sum *óreinska* skal vindast burtur úr - donsk, útlendsk, *óføroysk óreinska*. Men hvat skal tað skróvturra amboðið so brúkast til? Tað latínska orðið 'humor' betýðir *væta*. Hendan vætan smyr lívið og fær alt at ganga lættari.

Telefonbókin brúkar 'tengja' og 'kervi' í staðin fyri 'knýta' og 'skipan' ella 'net'. Á síðu 14 eru vit høgt uppi: *»Dusa tær í eini lokkanót av vitan og kunning… í einum kosmos av anarki… her fært tú prátað við fólk, ið eru uppvaksin um náttina…(?)«* Her hevði meiri sakligheit og turr fakligheit hóskað betur.

Patos og poesi mugu brúkast við varsemi. Og klombrut og misvísandi orð eru grús í maskinarínum. Orð verða ikki gjørd í Hundsarabotni, men búnast í samveru millum fólk; og eru tey nóg fín og mjúk og ókantut, so sníkja tey seg inn í oyrað.

Harðligheit og bravér eru av tó ónda - bæði í skaldskapi og sakprosa. Georg Brandes hevur rætt, tá ið hann ís ínum Samlee Værker, bind VI, s. 55 skrivar, ikki um føroyskan orðakunst, men um franska romantiska poesi: »Hvad man i poesiens egen interesse må fordre, er kun, at Årerne, i hvilde dette livesblod ruller, og som gerne må ses blånende under huden, ikke fremtræder spændte og sorte som på en forbitret eller syg«.


C.

Tvøroyrar Kirkjuráð

Hervið verður gjørt kunnugt, at listin yvir veljararnar til kirkjuráðsvalið hin 4. november 1997 liggur frammi til eftirlits í býráðsskrivstovuni á Tvøroyri í avgreiðslutíðini 20.-29. í hesum mánaði.

Møguligar kærur í sambandi við vallistan megu vera skrivligar og sendar undirritaða valstýri í seinasta lagi 8. sept. 1997.

Valstýri Tvøroyrar Kirkjuráðs,
hin 14. aug. 1997
S. v.
Torkil Hentze,
formaður



KROSSORÐAGÁTA

Krossorðasmiðurin hevur verið í summarfrí, men nú verður byrjað aftur við krossorðunum

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: Endaleysar seriur

F	O	R	Ð	U	M	M	I	L	S	I	E	L	L	A	Á	
R		I	N	N	I			Ø	S	T	A			O	R	M
E	S	P		Ð	A	G	U	R				S	Ð	P		E
S	U	P	E	R	M	A	N			S	T	A	P	I		N
S		A	K	A	I		I	N		V	E	G	U			N
I	N			N	P	K		S	L	Á	N	U	R			I
	I	N	A		A	O		Í	Í		Ð	R		I		N
B	A	Y	W	A	T	C	H		K	L	E	O		K		G
O	L			M	R		R	E	A		R	G		A		
G	L	Á	M	O	U	R		Y		Á	S	V	Ø	R		
E		K	A	R	L	A		S	Ø	R		I	Ð	O	L	
N	Á		R		J	G		K	A	I		K		S	E	
S	V	I	S	K	A	N		A			Y	A	K		S	
E	E	C			N	A	T	R	I	U	M		G	O	T	
125		E	L	I			J	U		N	S	Í		V	U	
Y	E	S	P	R	I	M	E	M	I	N	I	S	T	E	R	

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loysu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ….«** á bjálvan.

Loysunarorð: **126**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.